Marjun Holm, skúlastjóri:

## Ein kreppuloysn

**Skúlastjórin í Argja skúla, Marjun Holm, er sera kedd um vánaligu umstøðurnar skúlin bjóðar næmingunum. – Hetta er bara ein kreppuloysn, men hvussu leingi næmingarnir skulu vera í neystinum, veit eg ikki, sigur Marjun Holm**

SKÚLAGONGD
*Ingrid Bjarnastein*

Róðrarneystið á Argjum er langt frá nóg gott til at bjóða næmingunum. Og hetta er skúlastjórin í Argja skúla, Marjun Holm, væl varug við.

– Eg veit ikki, hvussu leingi næmingarnir skulu vera í neystinum. Men róðrarneystið er langt frá nóg gott til teirra, sigur Marjun Holm, skúlastjóri.

Hon vísir á, at um kvøldið eru ymsir aktivitetir í neystinum, so borð, talvur og stólar mugu flytast yvir til síðuna fyri at pláss skal vera fyri tiltøkunum.

– Hetta er ein kreppuloysn, onki annað. Hetta er ikki nakar nýggjur trupulleiki. Talan hevur verið um at byggja Argja skúla út síðani síðst í 80´unum, men arbeiðið kemur ikki víðari. Nú er tørvurin veruliga vorðin akuttur, og seinasta ár vóru tekningar og uppskot gjørd fyri at byggja skúlan út, men vit koma ikki víðari. Tað vísir seg, at íløguloftið hjá kommununi er ein trupulleiki, greiðir Marjun Holm frá.

Tosað hevur eisini verið um at keypa frímerkjadeildina hjá Postverkinum á Argjum, og gera hana til skúla, men heldur ikki á hesum økinum eru hendar nakrar broytingar.

– Vit eru tvungin til at taka næmingar inn, og í løtuni er talið á 365. Lærararnir eru sjálvandi eisini misnøgdir við hesa loysnina, og vit eru eisini kedd av at skula bjóða næmingunum slíkar umstøður, sigur Marjun Holm at enda.



*Marjun Holm er kedd av, at skúlin skal bjóða næmingunum so vánaligar umstøður, men enn veit hon ikki, hvussu leingi næmingarnir skulu húsast í Róðrarneystinum á Argjum*

*Savnsmynd*

Skúlanæmingar á neystarlofti:

# Vit vilja hava betri útgerð

**Róðrarneystið á Argjum skal nú hýsa 29 næmingum í 10. flokki. Hetta eru næmingarnir ikki nakað serliga væl nøgdir við. Borðini eru gomul, talvan er lítil og ongin útgerð er í neystinum, so sum teldur, sjónvarp og annað**



*Róðrarneystið á Argjum verður nú brúkt sum skúlastova hjá 10. flokki*

*Mynd: Finnur Justinussen*

SKÚLAGONGD
*Ingrid Bjarnastein*

**Argir:** Sólin hevur hug at kaga fram og veðrið er heilt gott úti á Argjum henda týsmorgunin. Hesin týsmorgun, sum helst er sum allir vanligir týsmorgnar hjá flestu føroyingum, er fyrsti skúladagur hjá 10. flokki í Argja skúla hetta skúlaárið. Fyrsti skúladagur fyri 10. ferð er nú heldur ikki nakað serligt í sær sjálvum, men hesuferð er fyrsti skúladagur ikki í sjálvum Argja skúla, sum hann hevur verið øll hini níggju árini. Í ár savnast næmingarnir aftur aftan á summarsteðgin í Róðrarneystinum á Argjum. Og her skulu tey húsast inn til okkurt betri er funnið til teirra.

Teir eru í góðum lag, hóast alt – næmingarnir. Ikki síggja tey nývaknað út heldur. Kanska tað góða veðrið spælir sín leiklut her. Nøkur standa uttanfyri, og í gongini eru eisini nøkur. Inni í stóra salinum í neystinum, sum nú átti at verið kallað skúlastova, sita nakrir næmingar. Onkur teirra etur, onkur situr og bíðar. Tey práta saman. Týðiliga sæst tó, at hetta ikki er nøkur skúlastova. Skúlaborðini eru gott nokk sett upp, sum um hetta var ein skúlastova, og ein heldur ússalig lítil talva stendur fremst við lærarapultin.

Farið verður upp ígjøgnum trappurnar. Har standa nakrar grønar sofur. Tær eru fullar av ungdómi. Útsýnið er gott – um ikki annað. Frá lítla loftinum sæst útyvir alla Havnarvág og yvir alla Havnina.

### Ongar teldur

Uppi á loftinum sita næmingarnir og práta. Teir hugna sær rættiliga. Kanska kann tað tykjast sum ein fyrimunur hóast alt, at vera sloppin undan øllum resinum yviri á skúlanum. Øllum buldrinum av hinum næmingunum.

Eini 15 eru tey, sum sita á loftinum. Tosað verður nógv saman. Um arbeiði, klæðir, um nýggju hølini. Spurd um, hvussu tað er at vera í neystinum, siga tey fyrst, at tað er eitt sindur ringt at siga, tí hetta er jú fyrsti skúladagur hjá teimum.

– Men tað er eitt sindur rotið, siga tey.

– Her er onki sjónvarp, ongar teldur, onki køliskáp, ongin ghettoblastari. Hetta eru ikki júst umstøður til skúla, halda tey.

Næmingarnir nevna eisini, at yviri í skúlanum hava tey júst fingið nýggj borð, sum eru góð fyri ryggin, og yviri í neystinum, standa gomlu og vrakaðu skúlaborðini.

– Fyri at vit skulu tíma at vera her, so mugu vit altso fáa eitt sjónvarp og ein ghettoblastara, siga tey.

– Og eitt køliskáp!, er onkur skjótur at leggja afturat.

Umstøðurnar eru ikki tipp-topp, men hóast alt, so lata tey ikki so heilt illa at.

– Her verður kanska eitt sindur einsligt í síðsta enda, tá ein bara sær tey somu fólkini alla tíðina, siga næmingarnir. – Ein verður kanska eitt sindur avbyrgdur frá øllum hinum, sum hendir á skúlanum.

Men hóast alt, so vóru deildar meiningar um alt. Fleiri næmingar vóru hóast alt glaðir fyri at vera á neystinum.

Mótmæla vilja tey heldur ikki.

– Tað nyttar onki, tí tey lurta ikki eftir okkum alíkavæl, sigur onkur. Og so er onkur annar, sum heldur okkurt annað, og so í eina stutta tíð er ein lítil málageipan um hetta. Men hon endar skjótt, og evnið verður skjótt okkurt annað – okkurt áhugaverdari.

### Ongin útgerð

Mánakvøldið vóru borð og stólar fluttir yvir í neystið. Og tá næmingarnir komu í »skúla« týsmorgunin vóru borð, stólar, talva og lærarapultur sett upp.

Ongin onnur útgerð er til næmingarnar. Teldur eru ongar, sjónvarp er onki.

Tímin eigur at byrja klokkan 9.40. Og klokkan, ja, hon er vorðin 9.50.

Næmingarnir byrja at ivast, um lærarnir yvirhøvur fara at koma.

– Heilt sikkurt teir hava gloymt okkum, tekur ein teirra til.

Men nei. Næmingarnir eru ikki gloymdir kortini. Fimm minuttir seinni koma tveir lærarar. Tað sær út, sum rokning er á skránni. Við sær hava teir skúlabøkur til komandi skúlaárið.

– Vit skulu fyrst plastað bøkurnar, sigur tann eini lærarin.

– Hevur nakar ein saks?

Men nei. Ongin hevði nakran saks. Og í slíkum føri ber ikki til at renna yvir í evningstovuna eftir einum saksi, tí ongin evningstova er til taks.

Síðani vísti tað seg eisini, at heldur onki krit var. Og onki ruskílæt.

Sjálvt um nógv rokilsi hevur verið burturúr neystinum á Argjum, so tykist tað sum um næmingarnir fara undir nýggja skúlaárið við góðum treysti. Hvørki neyst, vantandi teldur, sjónvarp, ghettoblastari, køliskáp ella nøkur kommuna, skal oyðileggja teimum seinasta skúlaárið við nógvum stuttligum upplivilsum.



*Uppi yvir skúlastovuni standa nakrar sofur har næmingarnir kunnu sita og hugna sær í fríkorterinum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Heðin Mortensen, mentamálanevndin:

## Frímerkjadeildin er ein góð loysn

**– Vit hava ikki ligið á lánið við Argja skúla, men tað vísir seg bara, at um vit skulu byggja allar skúlarnar í kommununi út í senn, so kemur hetta at kosta okkum um 2-250 mió. krónur, og íløguloftið er á 70 mió., sigur Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu**

SKÚLAGONGD
*Ingrid Bjarnastein*

Vaksandi barnatal, stórur tørvur, prioriteringar, íløguloft. Ja, orðini eru havd á munni meira enn einaferð, og tað vísir seg at aftur hesuferð er hetta trupulleikin tá tað kemur til næmingarnar í Argja skúla.

– Barnatalið er vaksandi, og tá talan er um at nøkta ein tørv noyðist ein at gera prioriteringar, sigur Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Kommunu.

Kommunan hevur í seinastuni verið í holt við at umbyggja Kommunuskúlan, umskipa Eysturskúlan, skúlin í Hoyvík hevur eisini fingið ein bita av lagkøkuni, men peningur er rætt og slætt ikki til allar skúlarnar í kommununi.

– Vit hava gjørt eina verkætlan fyri Argja skúla, har vit byggja gamla og nýggja skúla saman. Verkætlanin er eisini løgd fyri nevndina, ein kostnaðarætlan er gjørd, men íløguloftið forðar okkum í at fara víðari við málinum.

Heðin Mortensen nevnir eisini frímerkjadeildina hjá Postverkinum, sum møguligan skúla. Hann heldur, at frímerkjadeildin hevði verið ein fín og virðilig loysn, og hon hevði samstundis gjørt, at ikki verður neyðugt at útbyggja sjálvan skúlan.

– Frímerkjadeildina – tann bygningin høvdu vit kunnað keypt í morgin um tað skuldi verið, men hetta er ein umsitingarligur spurningur. Sum eg havi skilt, so er postverkið sinnað í at selja, men teir noyðast at fáa loyvi frá Landsstýrinum, greiðir Heðin Mortensen frá.

Og sum er nú, so liggur málið parkerað úti í Vinnumálastýrinum.

Um støðuna á Argjum sigur Heðin Mortensen, at hon er als ikki nóg góð.

Men hvat konkret verður gjørt í framtíðini er ilt at siga. Tað tykist, sum fyrst og fremst verður bíðað eftir svarið frá Vinnumálastýrinum.

Tíverri var Bjarni Djurholm staddur uttanlands við sløktari fartelefon, so tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á honum til eina viðmerking.


FÓLK
TIL MÓTTØKUNA
Á SMYRIL LINE

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til móttøkuna á Smyril Line.

Viðkomandi skal verða røkin, hava teldukunnleika, verða fryntlig/-ur og umframt norðurlendsku málini duga enskt og helst eisini nakað av týskum.

Møguleiki er fyri, at starvið verður sett sum 2 hálvtíðarstørv.

Løn samb. avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Umsóknin, merkt "Móttøkufólk", skal verða okkum í hendi innan 30. august og sendast til:

team85

SMYRIL LINE
Postsmoga 370 • 110 Tórshavn

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar. Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og meirilutan í sluppini "Norðlýsið".


14 CMYK